

Framleiðslan í 2014 gjørdist eitt vet betri enn Ben Arabo stjóri í Atlantic Petroleum metti frammanundan. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum: Framleiddi 1806 føt av olju um dagin í desember

**Jógvan Hugo Gardar**

03.01.2015 - 20:33

Oljan.fo

Í eini feskari dagføring sum Atlantic Petroleum hevur sent keypsskálunum í Oslo og Keypmannahavn sæst at framleiðslan hjá føroyska oljufelagnum var nakað hægri í desember enn tað felagið hevði mett. 2014 gjørdist eisini betri enn mett frammanundan.

Framleiðslan hjá Atlantic Petroleum varí desembur 56.000 føt av olju frá Chestnut, Ettrick og Blackbird oljubrunnunum. Meðalframleiðsn per samdøgur var 1806 føt. Hetta er eitt sindur meir enn væntað. Orsøkin til meirframleiðsluna er sambært fráboðanini at ein brunnur varð boraður áður enn ætlað.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum í 2014 var 587.000 føt ella 1.608 føt um dagin. Frammanundan metti tlantic Petroleum at framleiðslan í 2014 fór at liggja millum 1520 og 1600 føt um dagin.